## *Oddagrein*

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# DRELNES GEVUR ANNAÐ PERSPEKTIV

Tað er vorðin sum verkætlan, sum tey eru farin í holt við í Suðuroy - ætlanin at umskapa gomlu saltsiloina á Drelnes til ein altjóða mentanardepil.

»Drelnes«, sum suðuroyingar kallaðu siloina, hevur sína serligu søgu, bygd stutt fyri stríðsárini, tá fólk høvdu stórar visiónir um framburð - og hon lætti munandi um, tá sluppir og skip skuldu gerast út til fiskiskap.

Sum bygningur er hon eisini nakað heilt serligt. Øll, sum hava vitjað á Tvøroyri, hava lagt merki til henda óvanliga bygningin - hendan katedralin við bogaðum skapi og við stórum parabulformaðum betongsperrum – og so stóru stavirnar, S A L T, ið vóru málaðir á tekjuna.

At fólk nú hava givið hesum bygningi so stóran ans, at ein stór verkætlan um ein altjóða mentanardepil er veruleiki er veruliga gott og spennandi. At tað tykist bera til at fáa fígging til eina slíka ætlan – nærmast á útoyggj, tað er serliga áhugavert og setir útjaðarahugsanina í eitt annað perspektiv. Hví skal tað ikki ber til at hava ein slíkan depil í Suðuroy? Vit hava eitt stórt og gott skip, sum kann flyta nógv fólk aftur og fram millum Suðuroy og Havnina. Hetta er samstundis ein stór avbjóðing til oyggjarfólkið, tí at fáa innrás av fleiri hundrað mentanarhugaðum fólkum norðanífrá og uttanífrá, tað setir krøv og kann skapa vøkstur í oynni.

Stóra avbjóðingin - og veruliga royndin hjá nevndini fyri grunnin, sum stendur fyri verkætlanini, verður at finna fígging til hesar 80 milliónir krónurnar, sum verkætlanin er mett at kosta. Men tað er so heldur ikki hvør sum helst, ið stílar fyri. Fyrrverandi forseti Íslands er verji, og fyrrverandi danski fólkatingsformaðurin, Christian Mejdahl, sum er føddur á Tvøroyri, er nevndarlimur. Tað eru tekin um, at verkætlanin hevur altjóða dám.

Hetta at virðismeta gamlar bygningar er nakað, ið vit føroyingar ikki hava dugað nóg væl. Hóast vit ikki hava so nógv bygningsverk í Føroyum, so kundu vit saktans gjørt nógv meira við slíkt, sum hendan verkætlanin í Suðuroy er dømi um - samstundis sum vit áttu at broytt hugburð um bygging yvirhøvur. Orsøkin til at vit ikki hava so nógvar gamlar bygningar er sjálvandi tí, at vit ikki hava bygt so nógvar bygningar.

Saltsiloin á Drelnesi fer at standa sína roynd leygarkvøldið, tá stór konsert verður har. Hiðani geva vit bestu ynski til verkætlanina.



## Hví ikki hava ein slíkan depil í Suðuroy?



## Javnaðarfólk trupulleikar av privatskúlum

Danski Javnaðarflokkurin hevur fingið eina keðiliga sak, nú leiðandi fólk í flokkinum taka børn síni úr fólkaskúlanum og koyra tey í privatskúla, samstundis sum fleiri teirra ferðir hava hartað fólk, sum gera tað sama.

Tað heldur viðmerkjarin hjá Danmarks Radio, Jens Ringberg.

– Tey hava ein trupulleika. Flokkurin hevur jú staðið fyri, at fólkaskúlin er staðið, har øll kunnu senda síni børn, líka mikið um vit eru vællønt, fólkatingslimir, ella um vit eru arbeiðsleysir innflytarar.

Hann metir tó, at ringastu støðuna er Mette Frederiksen, næstforkvinna floksins, komin í. Hon hevur ein størri forkláringstrupulleika, enn floksforkvinnan, tí Mette Frederiksen fyri langari tíð síðani – áðrenn hon sjálv fekk børn, fanst harðliga at foreldrum, sum koyra børn síni í privatskúlar.

– Helle Thorning-Schmidt velur hinvegin at flyta dóttrina í privastkúla, eftir at hon hevur gingið sjey ár í fólkaskúlanum. Hon hevur eisini í smálutum greitt frá umstøðunum, og eg haldi, at tað merkir, at trýstið á Helle Thorning-Schmidt verður minni, meðan tað framhaldandi fer at tyngja hjá Mette Frederiksen, heldur Jens Ringberg.

Spurningurin er so, um hetta fær avleiðingar fyri Javnaðarflokkin, ella um flokkurin við opnum sinni fer í samráðingar við stjórnina, sum grundleggjandi ætlar at kanna fólkaskúlan.



## Varðveitið sýslumansheitið

HEINI OLSEN
KJAK Á SÍÐU 12



## Javnstøða ella feminisma

HERI MOHR
KJAK Á SÍÐU 12

## Seebach vil sleppa aftur til Føroya

Danska poppstjørnan Rasmus Seebach vitjaði í Føroyum um vikuskiftið. Ferðin til Føroya varð seinkað orsaka av øskuskýggjunum úr Ísland, men leygarkvøldið kom Seebach til landið, og hann var í Føroyum til fyrrapartin í dag.

Seebach hevði tvær framførslur leygarkvøldið, og sunnukvøldið var hann gestur í sendingini Hvonn Live á Rás2.

Hesaferð hevði Rasmus Seebach bert ein gittarspælarar afturat sær á pallinum, men Seebach vil sera fegin aftur til Føroya at spæla.

– Hetta hevur verið ein fantastisk ferð, og eg vil sera gjarna aftur til Føroya at spæla. Tá skal eg hava allan bólkin hjá mær við, sigur Rasmus Seebach.

Spurningurin er bara, nær tað kann lata seg gera, tí Seebach hevur úr at gera við framførslum í Danmark í alt summar. Men lítið er at ivast í, at føroyingar, sum tóku so væl ímóti danska poppsangaranum hetta vikuskiftið, sleppa at hoyra hann aftur á føroyskum palli innan ov langa tíð.



**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*